# i á nýggja Smyrli

skiftið august/september skal hann royndartúr. Væntandi er, at royndartúrurin fer at taka eina viku.

Annars verða alsamt fleiri og fleiri av teimum ymsu skipanunum umborð, royndar í hesum døgum og fyribils hevur alt gingið av tí besta.

Kristian Davidsen, stjóri á Skipasmiðjuni, sigur, at enn sigur tíðarætlanin at nýggi Smyril skal handast føroyingum tann 15. oktober, men at skipasmiðjan framvegis hevur sum mál, at tað skal gerast einar 14 dagar fyrr.



*Bjargingarútgerðin er eisini roynd. Her liggja tveir stórir bjargingarflakar við skipssíðuna. Vit síggja eisini tær yvirvaksnu »hosurnar«, sum ferðafólkið skreiðir niðurígjøgnum fyri at koma turrskødd í bjargingarbátarnar, skuldi ein neyðstøða tikið seg upp*

# Hava sett fulla ferð á arbeiðið at byggja skúladepilin í Hovi

**Landsstýrið hevur sett fulla ferð á arbeiðið at byggja skúladepilin í Hovi og nýggj bygginevnd er longu farin til verka**

SKÚLADEPIL

*Áki Bertholdsen*

*aki@sosialurin.fo*

Fyrsta januar í 2008 skal umstríddi skúladepilin í Hovi verða liðugur.

Tað vísir tíðarætlanin, sum landsstýrið hevur lagt fyri ætlanini.

Mentamálaráðið hevur valt bygginevnd í sambandi við byggingina og í henni eru umboð fyri bæði miðnámsskúlan, heilsuskúlan og mentamálaráðið.

Formaður í bygginevndini er Eyðbjørn Poulsen, deildarstjóri fyri vinnu- og miðnámsskúladeildina í Mentamálaráðnum.

– Bygginevndin hevur havt sín fyrst fund og vit hava sett fulla ferð á arbeiðið, sigur formaðurin.

Bygginevndin hevur eisini sett seg í sambandi við Arkitektavirkið hjá Árna Winther um at tekna skúlan. Tað var eisini hann, sum teknaði ætlaða miðnámsskúlan í Vági.

Sjálvur metir formaðurin í bygginevndini, at tað fer at taka eitt lítið ár at fyrireika byggingina, at projektera og at bjóða arbeiðið út og at tað fer at taka hálvtannað ár at byggja skúladepilin.

– Fyrsta uppgávan hjá bygginevndini verður at finna útav akkurát, hvar skúlin skal vera og at gera byggiskránna.

Løgtingið hevur játtað 60 milliónir til endamálið og fyri ta upphæddina skal byggjast ein skúladepil, sum skal hýsa heilsuskúla Føroya og miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Men møguleikin hevur verið nevndur at leggja aðrar útbúgvingar í skúladepilin seinni.

– Tað er onki dulsmál at aldursbýtið í Suðuroy er skeivt og at teir yngru árgangirnir eru smáir.

– Tá ið skúlabygging í Suðuroy umræður, hevur tað tí stóran týdning fyri landstýrið, at ein depil verður bygdur, sum alla tíðina kann laga seg til broyttar umstøður og sum kann laga seg til umstøðurnar í Suðuroy, fyri at fáa sum mest gagn burturúr pengunum, sigur deildarstjórin í mentamálaráðnum.

Eyðbjørn Poulsen sigur, at tað, sum bygginevndin hevur fingið boð um frá landsstýrinum, er, at skúladepilin í Hovi skal raðfestast ógvuliga høgt og at arbeiðast skal so skjótt sum gjørligt fyri at fáa hann lidnan.



*– Tað verður onkustaðni her í dalinum í Hovi, at nýggi skúladepilin í Hovi skal byggjast og nú verður arbeitt við fullari ferð. Tað skilst at nógv talar fyri, at skúladepilin verður bygdur onkustaðni niðanfyri landsvgin*

### Sjálvstøðugur skúli

Í løtuni er miðnámsskúlin í Vági undir rektaranum á studentaskúlanum í Hoydølum og heilsuskúlin á Tvøroyri er undir rektaranum á sjúkrarøktarfrøðiskúlanum.

– Men avgerð er tikin um, at táið skúladepilin í Hovi verður liðugur, verður talan um ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu, sigur Eyðbjørn Poulsen.

Hann sigur, at fyrsta uppgávan hjá nýggju leiðsluni fyri skúladepilin, verður at samskipa virksemið hjá heilsuskúlanum og miðnámsskúlanum í mest møguligan mun.